## Kona Popcysnki sjúk

Bold.dk skrivar, at kona pólska venjaran, Krzysztof Popczynski, er álvarsliga sjúk, og tað hevur ávirkað arbeiðið hjá Krzysztof seinastu tíðina. Nú koma foreldrini hjá Kryzysztof til Danmarkar at hjálpa soninum, og tey í Aarhus Fremad rokna við, at pólski venjarin, ið starvaðist í 10 ár í Føroyum, fær meira orku til at røkja venjarastarvið í felagnum.



## Popczynski spælari í Århus

Aarhus Fremad hevur tryggjað sær spæliloyvið hjá Krzysztof Popczynski, sum er venjari í felagnum. Men sambært stjóran er talan bert um eitt sindur av skemti mótvegis spælarunum. – Vit sóu, at Krysztof kundi sparkað ein vatndunk ein hálvan vøll, tá vit taptu 7-0 ímóti FC Fyn, so vit hildu, at vit skuldu fáa fatur á spæliloyvinum hjá honum, sigur Mogens Kamp við Bold.dk.



*Hjalgrím Elttør, Jóhan Troest Davidsen og hinir í NSÍ høvdu orsøk til at fegnast í Fuglafirði, har NSÍ vann á ÍF*

## Frøast yvir møguleikar

NSÍ-venjarin, Pauli Poulsen, var sjálvandi væl nøgdur, hóast tað gekk so long tíð, áðrenn munurin gjørdist tvey mál:

– Liðið hjá okkum vísti stórt sjálvsálit, og vit spældu okkum til nógvar møguleikar. Í fyrra hálvleiki vóru fleiri støður, sum áttu at havt borið mál við sær, og soleiðis var tað eisini eftir steðgin. Tá munurin bara er eitt mál, kann so nógv broytast, eitt nú í sambandi við eina deyðbóltsstøðu, men vit vóru ongantíð so kroystir, at vit ikki høvdu tak á tí, staðfesti Pauli Poulsen, sum nú hevur fokus á heimadystinum sunnudagin ímóti AB:

– Í Fuglafirði var um reppið, at tað eydnaðist at halda tætt í verjupartinum. Tað fara vit at arbeiða við at gera sunnudagin, samstundis sum vit vóna, at tað eisini tá fer at eydnast at spæla okkum til fleiri málmøguleikar. Tað ræður um at savna seg um eina uppgávu í senn, hóast tætt er millum dystirnar.

**jh**

ÍF-NSÍ 1-2 (0-1)

# Stórur munur á sjálvsáliti og styrki

*ÍF*

*NSÍ*

**Meðan NSÍ støðugt styrkir sína støðu í toppinum, so gongur tað mótsatta vegin hjá fuglfirðingum, sum aðru ferð á rað vóru stigaleysir á heimavølli**

**FÓTBÓLTUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í dýrdarveðrinum í Fuglafirði í gjár vann NSÍ 2-1, men munurin var rættuliga eyðsýndur. Heimaliðið, sum fyri aðru ferð í fýra dagar einki fekk burturúr á heimavølli, tykist hava tunga brekku fyri framman, meðan teir í Runavík, sum fyri aðru ferð í fýra dagar settu trý stig á kontuna, eru rættuliga sannførandi og heilt víst fara at kappast millum tey bestu.

ÍF eigur góðar spælarar, men tað hongur ikki nóg væl saman í liðavrikinum. Í uppspælinum verður liðið ofta steðgað orsakað av egnum mistøkum, og so er tað so skjótt, at tað verður vandamikið í hinum endanum, og ov ofta verða langar sendingar lagdar fram á mótstøðuhálvuna, tí møguleikarnir eru fáir og smáir at spæla stutt og trygt.

Hesa ferð var vandamiklasta uppspælið í høgru, har unglingaspælarin Dánjal á Lakjuni arbeiddi hart og vísti gott hegni, tá hann breyt ígjøgnum og legði innfyri, men tíðliga í seinna hálvleiki varð hann tikin av vøllinum.

Bartal Eliasen var aftur hesa ferð uttanfyri við skaða, men Poul Ennigarð hevði í miðverjuni gott tak á NSÍ-toppskjúttanum, Károly Potemkin, sum hann hevði í heilt stuttum tjóðri.

Hjá ÍF sum heild var verjuavrikið ikki gott, tá ið NSÍ miðskeiðis í fyrra hálvleiki setti hol á. Potemkin slapp í eitt sindur trongari støðu í høgru at varðveita bóltin og bíða, til Jann Martin Mortensen, sum hesa ferð hevði útgangsstøðu á vinstra kanti, rann seg í góða støðu í brotsteiginum, har hann millum fleiri mótstøðumenn setti fótin undir bóltin eftir flatt innlegg og so var 1-0 til NSÍ.

### Breidd og tyngd

NSÍ hevði bæði í fyrra og seinna hálvleiki eina røð av møguleikum at økja um leiðsluna og harvið at taka spenningin burtur, men teir søplaðu og søplaðu.

Í nógvum teimum fyrstu umførunum skoraði Károly Potemkin, men nú hevur verið turkur hjá honum tríggjar dystir á rað. Í Fuglafirði hevði hann onkran gyltan møguleika, og í fleiri førum kundi hann havt spælt viðspælarar blankar framman fyri málinum.

Einar tvær ferðir var Hjalgrím Elttør í góðum støðum, tá toppskjúttin valdi at royna sjálvur, og serliga ta einu ferðina í seinna hálvleiki, tá NSÍ hevði vunnið bóltin í ótryggum ÍF uppspæli, valdi toppskjúttin at fara sjálvur ímóti tveimum mótstøðumonnum, í staðin fyri at spæla púra blanka Boga Løkin.

NSÍ var í øllum omaná. Jens Joensen var vinstri vongverji í staðin fyri Einar Hansen, sum var sjúkur. Verjuavrikið var sum heild gott, og á sentrala miðvøllinum var eingin ivi. Bogi Løkin, Jústinus R. Hansen og Jann Ingi Petersen vunnu nærdystirnar og dugdu betur at finna hvønn annan og viðspælararnar enn mótstøðumenninar, og í síðunum arbeiddu Hjalgrím Elttør og Jann Martin Mortensen væl.

Síðstu løtuna gekk nógv fyri seg á NSÍ-hálvuni, og í onkrum deyðbóltsstøðum var spenningur framman fyri Meinhard Joensen, sum einar tvær ferðir bjargaði væl.

NSÍ var meiri vandamikið í mótálopum, og tá ein minuttir var eftir av vanligu leiktíðini, tók Bogi Løkin spenningin burtur. Andras Gango hálvbjargaði tvær ferðir, áðrenn hann var prísgivin.

Tað tóktist sum um, at tað hesa ferð skuldi eydnast NSÍ at halda tætt, men í yvirtíðini umsetti Andy Olsen, sum var mest eyðsýndi ÍF-spælarin í framrættaða partinum, brotsspark til mál, eftir at Óli Hansen hevði felt Frank Poulsen.

Trý stig fóru út á Skálafjørðin, har posin ivaleyst fer at tyngjast nógv aftrat, og har alt bendir á plasering millum tey í toppinum. Hjá ÍF er takið í fyrstu atløgu at skava stig saman fyri at sleppa úr botninum.

## Sjálvsálitið minkar

Fyri tveimum vikum síðani sá tað ikki so galið út í Fuglafirði, har ÍF vann bæði á B68 og KÍ. Síðani hevur gingið minni væl, og úrtøkan hevur í trimum umførum í landskappingini verið eitt stig:

– At úrslitini eru soleiðis, ávirkar sjálvsálitið. Vit hava nú runnið aftan á HB og NSÍ, uttan at tað hevur eydnast at fingið nakað burturúr. Hesi bæði liðini eru í løtuni tey bestu, og hóast mótstøðan eisini tykist vera ógvuliga stór, tá ið vit tær báðar næstu ferðirnar skulu spæla ímóti EB/Streymi og Víkingi – bæði í steypakappingini og landskappingini – so falla vit ikki í fátt, sigur ÍF-venjarin Jón Simonsen.

Aftur hesa ferð vóru teir í Fuglafirði noyddir at gera fleiri broytingar. – At Bartal Eliasen, Høgni Zachariassen og Hanus Eliasen eru plágaðir av skaðum, hevur sína ávirkan, men soleiðis eru treytirnar, staðfestir hann.

**jh**